# Jerusalem til Føroya

**Svenski gospelrockbólkurin lovar, at teir fara ikki at spreingja eins sterkar bumbur hesaferð, sum teir gjørdu seinast. Teir spæla í Runavík um tríggjar vikur**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Leygarkvøldið 19. mai fer ein av bestu gospelrockbólkunum í Europa at spæla á stórari konsert í ítróttarhøllini í Runavík.

Svensku Jerusalem koma til Føroyar at hava konsert, og teir eru ikki hvør sum helst. Síðani teir byrjaðu at spæla í 1975 hava teir verið roknaðir sum ein tann besti gospelbólkurin í Europa.

Teir spæla harðan rocktónleik, tó altíð við einum beinraknum kristnum boðskapi.

### Upprunamanningin

Tað var Ulf Chrstiansson, sum stovnaði bólkin í 1975, og hetta hendi, eftir at hann varð vorðin trúgvandi kristin. Tað var ymiskt, hvussu nýggju gospelrockarnir vórðu móttiknir av fólki – tað var alt frá fagnarrómi til veruligt hatur.

Tað var ókent tá í tíðini, at kristnir bólkar spældur so harðan tónleik við kristnum innihaldi – og so enntá í kirkjum og samkomuhúsum.

Jerusalem fullu ikki í fátt av mótburðinum, og tað skuldi vísa seg at verða ein skilagóða avgerð. Teir hava gjøgnum árini sæð, hvussu túsundtals av ungfólki hava tikið í móti teimum og boðskapinum, teir bera.

Manningin í bólkinum hevur verið fyri fleiri útskiftingum gjøgnum árini, men nú er bólkurin mannaður við teimum, sum vóru við frá byrjanini. Teir eru: Ulf Christiansson, gittar og sang, Dan Tibell, keyboard, Anders Mossberg, bass, og Klas Anderhell, trummur.

Upprunamanningin hevur givið fleiri fløgur út seinnu árini.

### Eingin bumba hesferð

Jerusalem hevur einaferð áður spælt í Føroyum. Tað var í áttatiárunum og hvør minnist ikki tiltiknu bumbuna, sum teir brustu. Bumban var nakað hart lødd, tí hon mundi blást oyrini av fólki, men teir í Jerusalem hava lovað fyrireikarunum, at hetta verður ikki endurtikið.

Tað er nýstovnaða felagið, Adore Music, sum stendur fyri konsertini. Felagið varð stovnað fyri nøkrum mánaðum síðani við tí endamáli at stimbra kristnað tónleikin í Føroyum við at skipa fyri konsertum, festivalum og ymiskum ráðstevnum.

Konsertin við Jerusalem er fyrsta stóra tiltakið hjá felagnum.

Atongumerki til konsertina leygarkvøldið 19. mai fáast á Statoilstøðunum kring landið og kosta 125 krónur.



*Klas Anderhell og hinir í gospelrockbólkinum, Jerusalem, koma til Føroya at hava konsert um tríggjar vikur*

## Týr fingið spennandi tilboð

**Tað gongur av sonnum væl hjá rockbólkinum Týr. Teir klára seg væl í tónleikakapping, teir luttaka í, og í kjalarvørrinum av Prix Føroyum, hava teir fingið spennandi tilboð um upptøku, ið ikki kann sigast at koma frá týdningarleysari síðu**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Hóast bólkurin Týr ikki var millum 3 teir fremstu, tá dómaraatkvøðurnar vórðu taldar upp á Prix finaluni fyri viku síðani, so tykist, sum fáa teir væl burturúr luttøkuni. Teir vórðu valdir sum gestir á Jellingfestivalinum í ár.

Teir eru við í stórari tónleikakapping og tað gongur væl. Tann 23. maj spæla Týr í Vega í Keypmannahavn.

### Spennandi tilboð

Í kjalarvørrinum av Prix Føroyar finaluni, hava Týr fingið tilboð um at koma til upptøku. Og tað er ikki júst ein og hvør, ið hevur boðið teimum.

Ein av útlendsku gestunum til finaluna hesaferð, ið eisini vitjaði finaluna í 1999, var Jens Ove Friis. Hann er stjóri í CMC-Records og er t.d. maðurin, ið tók Creamy undir sínar veingir. Hann hevur føroyska konu og vitjar ofta í Føroyum, fyri at lurta eftir, hvat rørir seg á føroyska tónleikapallinum.

Eftir finaluna segði Friis við Sosialin, at honum dámdi væl Týr, hóast hann ikki júst visti, um hann tordi at bjóða teimum plátusáttmála. Týr fara aftur til røturnar, kvæðini, og hetta dámdi Friis væl. Hann segði, at honum lysti at vita, um hetta eisini hevði kommersiella megi.

Og nú hevur Jens Ove Friis boðið Týr at koma í upptøkuhølini. Hvat stendst av hesum, er sjálvsagt ógjørligt at siga, men staðfestast kann, at Týr avgjørt er ein bólkur, ið hevur nógv jørn í eldinum í løtuni og nøkur av jørnunum eru heit.



*Týr hava nógv jørn í eldinum. Teir klára seg væl í tónleikakapping, ið teir eru við í. Tann 23. maj spæla Týr í Vega í Keypmannahavn. Og tilboð er nú komið um upptøku og tað er ikki ein og hvør, ið stendur aftanfyri*

Fyri fyrstu ferð í Føroyum




Fleirfalda ferðina á internetinum..!

**Við sn@rNET hjá Føroya Tele kanst tú ferðast á internetinum við rúkandi ferð alt samdøgrið.**

sn@rNET PRIVAT

| Downstream | Upstream | Stovningargjald | Mánaðargjald |
|---|---|---|---|
| 256kbps | 64kbps | 3.995,- | 449,- |
| 512kbps | 128kbps | 3.995,- | 649,- |

*Dátamongdir verða avroknað við 1,50 kr. fyri hvørt megabýt fyri útland og 0,50 kr. fyri hvørt megabýt fyri innanlands dáta. Prísirnir eru við MVG.*

sn@rNET VINNULIGT

| Downstream | Upstream | Stovningargjald | Mánaðargjald |
|---|---|---|---|
| 256kbps | 256kbps | 9.996,- | 1.545,- |
| 512kbps | 512kbps | 9.996,- | 1.396,- |
| 1024kbps | 512kbps | 9.996,- | 1.716,- |

*Dáta verða avroknað við 0,80 kr. fyri hvørt megabýt. Prísirnir eru uttan MVG.*

Føroya Tele kann nú bjóða tær eina heilt nýggja tænastu, ið kallast sn@rNET. Hetta er eitt fast samband bygt á ADSL tøknina, ið gevur tær eina móttøkuferð upp til 1024 k/sek*), har tað vanliga uppringda sambandið, vit kenna í dag, bert kann móttaka og senda upplýsingar við eini ferð millum 28 og 56 k/sek. Umframt skjótu ferðina eru eisini hópin av fyrimunum og nýggjum møguleikum við tænastuni.

Vilt tú vita meira um sn@rNET, er tú vælkomin inn í eina av Telebúðunum eftir einum faldara ella vitja okkara heimasíða á www.tele.fo.

*) *Galdandi fyri virki. Fyri privat kann hægsta móttøkuferðin vera 512 kb/sek.* ***Avmarkingar:*** *Av tí at ADSL-tøknin setur stór krøv til telefonlinjuna, eru avmarkingar fyri, hvar Føroya Tele kann veita sn@rNET.*

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum*

Føroya Tele • Postboks 27 • 110 Tórshavn • Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • e-mail: ft@ft.fo • www.tele.fo

petur & petur • 320870



# Helena fær harðar ákoyringar

**Ákoyringarnar frá samgongutingfólkum móti Helenu Dam á Neystabø vóru mangar og harðar í tinginum í gjár**

ORÐASKIFTI
*John Johannessen*

Rættiliga stórur partur av orðaskifinum í gjár við víðkaðu triðju viðgerð av uppskotinum hjá Hendriki Old um at lække bensinavgjaldið snúi seg um innanhýsis ósemjur í samgonguni.

Serliga var tað Helena Dam á Neystabø, forkvinna Sjálvstýrisfloksins, ið fekk toyggið frá samgongufeløgum úr bæði Fólkaflokkinum og Tjóðveldisflokkinum.



Ákoyringarnar snúu seg millum annað um framferðina hjá Helenu Dam á Neystabø í fjølmiðlunum seinastu tíðina. Eyðun Viderø úr Fólkaflokkinum var eitt teirra, ið vísti á, at Helena seinastu tíðina hevur gjørt alt fyri at nýta fjølmiðlarnar til egnan vinning og samgonguni at bága. Hann vísti á útmeldingar hennara um, at løgmaður eigur at skriva út nýval, og síðani staðiligu áheitanirnar, um ikki at skriva út val og annar almennu ákoyringarnar móti Fólkaflokkinum og Tjóðveldisflokkinum.

Eyðun Viderø fanst eisini at atburðinum hjá Helenu Dam á Neystabø, tá samgongan var í kreppu, orsakað av, at Høgni Hoydal hevði borðið sjálvstýrisuppskotið í tingið uttan semju í samgonguni. Tá førdi Helena Dam á Neystabø seg fram sum semingskvinnuna, ið arbeiddi fyri at bjarga samgonguni. Men hetta var sambært Eyðuni Viderø beinleiðis lygn. Eyðun Viderø vísti í tinginum í gjár á, at Helena Dam á Neystabø einki hevði gjørt fyri at bjara samgonguni.

Aðrar smærri ákoyringar komu eisini frá Páll á Reynatúgvu og Rúnu Sivertsen, millum annað um handfaringina av pensjónsmálinum. Páll á Reynatúgvu vísti á, at løgmaður helt hondina yvir Helenu Dam á Neystabø í sambandi við pensjónsmálið.

Orðaskiftið skuldi annars snúgva seg um, hvørt bensinavgjaldið skuldi lækkast ella ikki.

## Bensinavgjaldið lækkar

**Uppskotið hjá Hendriki Old um at lækka bensinavgjaldið varð í gjár samtykt í løgtinginum. Fólkaflokkurin atkvøddi saman við andstøðuni, og Tjóðveldisflokkurin er noyddur at slúka enn ein kamel**



*Hendrik Old*

SAMGONGU-ÓSEMJA
*John Johannessen*

Uppskotið hjá Hendriki Old um at lækka bensinavgjaldið, sum fyri tíð síðani elvdi til stóra samgongukreppu, varð í gjár samtykt í løgtinginum.

Tað var Fólkaflokkurin, sum var orsøk til, at uppskotið varð samtykt. Hann atkvøddi fyri, hóast Tjóðveldisflokkurin áður hevur funnist at Fólkaflokkinum fyri at taka undir við málinum og eisini beinleiðis hevur víst á, at hetta kann hótta samgongusamstarvið.

Men tað letur til, at Tjóðveldisflokkurin enn einaferð hevur svølgt kamelar fyri at náa málinum um fullveldi. Tjóðveldisflokkurin atkvøddi í gjár ímóti uppskotinum. Men hóttanirnar um, at samgongusamstarvið er í vanda, verða eftir øllum at døma ikki framdar í verki, hóast Fólkaflokkurin atkvøddi fyri.

# Suðuroyingar fáa ikki flogsamband

**Tað verður ikki í bræði, at flogfør fara at flúgva ímillum Suðuroynna og Havnina. Landsstýrið heldur, at nýggi Smyril loysir samferðslutrupulleikarnar hjá oynni**

FYRISPURNINGUR
*John Johannessen*

Tað loysir seg ikki at røkja part av sambandinum millum Suðuroynna og Havnina við vatnflogfari.

Hesa niðurstøðu úr Samferðsluætlanini frá 1999 vísti Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í Vinnumálum á, tá hann á tingfundinum hósdagin svaraði einum skrivligum fyrispurningi frá Hergeir Nielsen úr Tjóðveldisflokkinum. Hergeir Nielsen spurdi, hvat landsstýrismaðurin hevur gjørt fyri at kann loftvegis sambandið við Suðuroynna, og nær hann fer at leggja úrslitið fyri løgtingið.

Bjarni Djurholm vísir í svari sínum á, at Samferðsluætlanin í síni niðurstøðu legði dent á, at tað ikki bar til at gera nakra almenna niðurstøðu um møguleikarnar fyri flogsambandi millum Suðuroynna og Havnina, av tí, at



tøka tilfarið tá var so mikið óvist. Samferðsluætlanin vísti á, at um eitt størri flogfar verður nýtt, sum kann taka so mikið nógv av ferðafólki og farmi, at Smyril kann minka túratalið, er støðan brádliga ein heilt onnur, og nýggjar kanningar mugu gerast.

Men Bjarni Djurholm sigur seg hava raðfest uppgávuna at betra um sjóvegis sambandið við Suðuroynna hægri, enn at kanna tørvin fyri loftvegis sambandi við einum størri flogfari.

– Suðuroyingar kunnu nú innan fá ár vænta at fáa eitt nógv betrað sjóvegis samband, og verður íløgan í nýtt Suðuroyarskip helst tann størsta íløgan, ið tað almenna nakrantíð hevur framt, segi Bjarni Djurholm.

Men landsstýrismaðurin vísti tó á, at hann hevur sett ein embætismannabólk at gera eina ætlan fyri undirstøðukervið í Føroyum, ið skal betra um grundarlagið fyri langtíðar íløguætlanini innan vinnumál. Og í hesi ætlan verður sambandið við Suðuroynni eisini viðgjørt.

